**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1042**
**Tíðarskeið 3/11-8/11-2010**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Rógvi K.Mouritsen og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, tveir MikroCat at kalibrera, útgerð at taka ein streymmátara upp við. Ein drívboya at seta út.

**Um túrin:** Vit fóru út mikukvøldið 3/11 kl.2200. Siglt varð eystur á støð N1, har vit byrjaðu skurðin og tóku støðirnar norðureftir, vit tóku allan skurðin norður á 64°30N.
Tá liðugt var at taka støðir á skurði N, settu vit eina drývboyu út, sum eitt skip hevði tikið upp av misgávum.
Vit sigldu so inn á støð V1 vestur úr Trøllhøvda, og tóku skurðin vestur á Føroyabanka og víðari vestur á støð V19.
Tá liðugt var at taka støðirnar á skurði V, sigldu vit inn í Bankarennuna, har vit tóku ein streymmátara NWFH upp, á pos. 61°24-008°20V, dýpið var 833 m.
Tá mátarin var komin innanborða, varð siglt suður á Munkagrunnin. Vit tóku skurð S av Munkagrunninum og móti Hetlandi, men bert til oljufeltið. Haðani sigldu vit so norður á skurð E, sum vit tóku inn móti Nólsoy.
Alt riggaði, sum tað skuldi, og alt gekk væl.
Vit vóru aftur á Havnini sunnukvøldið 7/11 kl. 2230.

**Prøvataking:** Við Seabird CTDini tóku vit 49 støðir og saltprøvar á øllum. Á eini støð norðanfyri og eini vestanfyri vórðu tveir MikroCatar kalibreraðir saman við CTD-ini.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir eru analyseraðir.

**Viðmerkingar:**

10-2-2011 __________________________
Regin Kristiansen

Vend



Støðir og kósir á túri 1042